# Jarvin koyrir solo

**At Pedagogfelagið boðar frá verkfalli, sum síðani vísir seg at vera forboðið, er bara enn eitt dømi um, hvussu illa stendur til í felagnum. Hetta heldur Ann Elisabeth Joensen, sum var mótvalevni hjá Jarvin Feilberg, tá ið hann var valdur til formann í felagnum.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*– Nevndin skal fyrst og fremst røkja áhugamálini hjá limunum í felagnum. Og her hugsi eg um arbeiðsumstøður og ikki minst lønarspurningin – og onki annað, sigur Ann Elisabeth Joensen*

- Formaður Pedagogfelagsins Jarvin Feilberg koyrir fullkomiliga solo, og hann konsentrerar seg um alt annað enn fakfelagspolitikk. Hetta sigur ein sera vónbrotin og ikki sørt hvassorðað Ann Elisabeth Joensen, frítíðarskúlaleiðari, sum eisini var mótvalevni til formansvalið hjá Pedagogfelagnum, tá Jarvin Feilberg varð valdur til formann.

- Fyri at siga tað bart út, so eri eg rættiliga forsyndrað inn á formannin og nevndina í Pedagogfelagnum. At felagið boðar frá verkfalli, sum síðani vísir seg at vera forboðið, er bara enn eitt dømi um, hvussu illa stendur til í felagnum, sigur Ann Elisabeth Joensen. Hon heldur tað vera ótrúliga illa umhugsað, at man ikki hevur hugsað um tað, áðrenn man fer út og boðar frá verkfallið.

- Ongin ivi er um, at hann er lopin framav.

### Dugur ikki at leiða

Ongin ivi er um, at Ann Elisabeth Joensen og Jarvin Feilberg hava hvør sína áskoðan á, hvussu felagið átti at verið rikið.

- Tá man leiðir, má man tora at skera ígjøgnum. Annars skal man halda seg vekk. Jarvin dugur ikki at halda høvdinum kalt, men letur seg ávirka av stemningum og streymum, og eg haldi virkuliga ikki, at arbeiðið í Pedagogfelagnum er nóg gott, sigur Ann Elisabeth, sum hevur fleiri øki, sum hon finst at.

### Ongin kunning

- Tað er ein afturvendandi og generellur trupulleiki, at vit limir fáa onki at vita um, hvussu stendur til, eitt nú í sambandi við samráðingarnar, sigur Ann Elisabeth Joensen. Hon greiðir frá, at heldur ikki álitisfólkini verða kunnað.

- Eg spyrji og spyrji, men álitisfólkið veit ongantíð meira enn vit onnur. Til dømis í morgun, tá ið verkfallið varð avlýst. Eg hoyrdi tað gjøgnum miðlarnar og álitisfólkið visti av ongum, og kundi tí ikki kunna okkum um nakað, sigur Ann Elisabeth, sum eisini fýlist á, at felagið ikki brúkar heimasíðuna.

- Har stendur ongantíð nakað, so tey áttu bara at niðurlagt hana, staðfestir hon.

### Jólasølan avlýst

Júst í hesum døgum er nógv jólarok á skránni hjá nógvum stovnum, og vit vita, at bæði jólahugni og kirkjugongd hjá onkrum stovnum varð avlýst í sambandi við fráboðaða verkfallið. Soleiðis var eisini í Frítíðarskúlanum í Hornabø, har Ann Elisabeth Joensen er leiðari. Hon greiðir frá, at seinastu tveir mánaðirnir hava børnini framleitt, pakkað og prísað vørur til jólasølu í jólabýnum í miðbýnum í dag og í morgin, har tey hava leigað tvey smá hús at selja úr.

- Nú er hetta avlýst, og eg roknið við at børnini vera sera kedd, tá tey koma oman aftaná skúlatíð í dag. Kanska kunnu vit bjarga einum parti av tí í morgin, men her ganga 67 børn, og tað er ikki bara sum at siga tað at fyrireika eitt slíkt tiltak, sigur Ann Elisabeth, sum heldur tað vera sera torført at halda huginum uppi, tá slíkt hendir.

### Helvtin lyftir fyri øll

Eitt annað, sum Ann Elisabeth finnst at, er, at hetta er aðru ferð, at bara dagstovnaøkið skal leggja arbeiðið niður.

- Vit eru øll í sama felag, bæði vit á dagstovaøkinum og á serøkinum. Kortini velur man, nú fyri aðru ferð, bara at leggja arbeiðið hjá starvsfólkunum á dagstovnaøkinum niður, sigur Ann Elisabeth, sum heldur, at tað altíð eru tey á dagstovnaøkinum, sum skulu altíð kempa fyri øllum limunum.

- Samráðingarnir fevna um allar limirnar, tí lønarhækkingarnar fevna um allan bólkin, sigur Ann Elisabeth Joensen, sum heldur tað vera sera óheppið, tí pedagogarnir eru so sperdir frammanundan.

- Vit hava so nógv annað at dragast við, so hetta er bara at leggja stein omaná byrðu, sigur Ann Elisabeth Joensen, og vísir millum annað á, at fakliga støðið er nógv ávirkað av at stórur mangul er uppá pedagogar.

### Arbeiðsumstøður og løn

Ann Elisabeth sigur, at Jarvin er ikki einsamallur har, men hann er leiðari fyri nevndini og limirnar.

- Vit bæði eru als ikki samd um bygnaðin í felagnum, og eg haldi ikki, at hann røkir sína uppgávu til lítar.

Spurd, hvat hon meinar við, tá ið hon sigur, at hon og formaðurin eru púra ósamd um linjuna hjá felagnum, sigur hon, at Jarvin Feilberg konsentrerar seg alt ov lítið um fakfelagsspurningar, og alt ov nógv um slíkt, sum áhugafeløg áttu at arbeitt við.

- Formaðurin og nevndin brúka orkuna skeivt, tá tey skipa fyri slíkum sum tiltøkum um familjupolitikk í Miðlahúsinum. Hetta er ikki teirra uppgáva. Tey skulu fy rst og fremst røkja áhugamálini hjá limunum í felagnum. Og her hugsi eg um arbeiðsumstøður og ikki minst lønarspurningin – og onki annað, sigur hon.

- Tá Jarvin ikki hugsar um fakfelagspolitikk millum samráðingarnar, so er tað ikki løgið, at tað endar við verkfalli. Men vit hava ongantíð fund um fakfelagspolitikk, sum er essensurin hjá felagnum, sigur hon.



*Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum*

Jarvin Feilberg Hansen:

# Eg eri ikki lopin framav

**Hóast fráboðaði arbeiðssteðgurin hjá Føroya Pedagogfelag í morgun var avlýstur, tí at Fasti Gerðarrætturin segði hann vera óheimmilaðan, so heldur formaðurin fast við, at Pedagogfelagið hevur gjørt sítt heimaarbeiði**

FAKFELAG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Jú, vit hava gjørt okkara heimaarbeiði!

So avgjørdur er formaðurin í Føroya Pedagogfelag, tá Rás 2 í morgun setti honum spurningin, beint eftir at Fasti Gerðarrætturin hevði avlýst fráboðaða arbeiðssteðgin hjá felagnum, sum lýstur var at verða frá kl 11 í morgun til kl 11 í morginári.

Jarvin Feilberg Hansen sigur, at tá tey fóru av samráðingarfundinum kl. 15 seinnapartin í gjár mettu tey, at samráðingarnar vóru slitnaðar, og tí boðaðu tey limunum frá arbeiðssteðgi á dagstovnunum og forskúlum.

- Tað næsta vit frætta er, at vit skulu møta í Fasta Gerðarrættinum í morgun kl 9, tí at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevði sent eitt kærurit inn.

Spurdur um slíkt eigur at koma fyri soleiðis, at bæði foreldur og pedagogar hava fyrireikað seg og lagt til rættis eftir hesum, svarar Jarvin Feilberg Hansen, at tey hava handlað út frá siðvenju.

- Í fjør tann 6. oktober vóru vit eisini í arbeiðssteðgi og tað hava vit verið fyrr uttan at nakar hevur sent nakra kæru til nakran kærustovn, og tí hava vit handlað út frá hesum, sigur formaður pedagoganna.

*Men ert tú ikki lopin framav?*

– Nei, tað haldi eg slett ikki. Endamáli var at vísa Føroya Fólki, at vit ikki eru komin á mál. Vit settur 1. desember sum evsta mark – men hava valt hava dialogin koyrandi uttan at leypa framav, sigur Jarvin Feilberg Hansen, sum ikki heldur, at langt er millum partarnar. Nú bíðar Pedagogfelagið eftir útspæli frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Lógin um Fasta Gerðarrættin kom í gildi 1. apríl í 2006, so enn eru ikki nógvar siðvenjur skaptar út frá niðurstøðunum – men júst hendan avgerðin fer kanska at hava týdning í framtíðini.